## Raul til New York

32 ára gamli Raul, ið er tann spælarin, sum hevur skotið flest mál í søguni hjá Real Madrid, hevur sitið nógv á beinkinum seinastu tvey kappingarárini. Og tað hevur eftir øllum at døma gjørt, at hann nú hevur tikið avgerð um at skifta felag. Spanska Marca veit í øllum førum at siga, at Raul og New York Red Bulls eru komin ásamt um eina avtalu, sum tryggjar honum somu løn, sum hann í dag fær í Spania. Enn eru tíðindini ikki váttað, men Raul sigur við blaðið, at hánn í 15 ár hevur vunnið tað, sum kann vinnast við Real Madrid. Og at tað sjálvandi ikki er nøkur nøktandi støða, nú hann hevur sitið á beinkinum seinastu tríggjar mánaðirnar.



## Maradona skeldar Valdano

Argentinski landsliðsvenjarin, Diego Maradona, er í øðini um Valdano, sum í 1986 var álopsmakkari hjá Maradona, tá Argentina vann HM. Valdano er í dag ítróttarstjóri í Real Madrid, sum hevur tríggjar argentinskar spælarar í hópinum. – Hann átti at tryggja teimum spælitíð og á tann hátt hjálpt landi sínum. Men hann hevur syrgt fyri, at Fernando Gago ikki sleppur nakran veg, hóast hann ikki verður nýttur í Madrid. Og Higuain situr á beinkinum, hóast hann hevur skorað meira enn Benzema og Raul. Og tað er ikki nøktandi, tí eg vil hava spælarar, sum eru í dystarvenjing, sigur Maradona.

# Sólvá Dimon heimaftur



Sólvá Dimon kemur aftur til Føroya mánadagin, eftir at hon í hálvtannað ár hevur roynt seg sum flogbóltsspælari í bæði Luxembourg, Svøríki og Danmark
Mynd: Thomas Guldager

**Eftir hálvtannað ár í útlegd, kemur flogbóltsspælarin, Sólvá Dimon, nú heimaftur til Føroya. Hon fer at styrkja um liðið hjá TB í trimum teimum síðstu dystunum í landskappingini hjá kvinnunum**



einsltsir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

Fyrru hálvu av kappingarárinum vóru tveir føroyskir spælarar í bestu donsku flogbóltsdeildini, men nú er eingin eftir. Mánadagin kemur 21 ára gamla Sólvá Dimon heimaftur, eftir at hon í eitt hálvt ár hevur spælt við danska felagnum, Brøndby VK. Eisini 19 ára gamla Karina Debes, sum spældi við Gentofte Volley í fyrru hálvu, hevur verið heima síðani á jólum og hevur spælt við Fleyr.

– Eg vildi fegin hildið fram, tí tað er serliga torført at fara avstað, nú eg júst eri komin ordiliga fyri meg og í síðstuni havi fingið nógva spælitíð. Men eg skal ikki í skúla aftur fyrr enn í august og fái einki arbeiði niðri í løtuni, so tá eg onga inntøku hevði, mátti at velja at flyta heimaftur í eina tíð, sigur Sólvá Dimon, sum í hálvtannað ár hevur roynt seg sum flogbóltsspælari í bæði Luxembourg, Svøríki og Danmark.

Í fyrraárið spældi hon í eitt hálvt ár við felagnum, VB Amber-Lënster, í Luxembourg, áðrenn hon í eitt lítið hálvt ár spældi við Svedala Volley í bestu svensku deildini. Og síðani í summar hevur hon so spælt við Brøndby VK í bestu donsku deildini.

### Noyðist at bíða

– Hetta hevur verið ein bæði gevandi og lærurík tíð uttanlands, har eg havi tikið meg nógv fram og fingið gott viðføri sum spælari. Men samstundis verður tað eisini stuttligt at koma heimaftur at spæla við TB, sum eg ikki havi spælt við í meiri enn tvey ár, sigur Sólvá, ið noyðist at bíða til síðst í hesum mánaðinum, áðrenn hon kann spæla fyrsta dystin í Eik-liguni.

– Eg spældi síðsta dystin við Brøndby VK tann 27. januar, so eg má bíða ein mánað, áðrenn eg sleppi at spæla ein dyst í Føroyum. At tað so verður ímóti SÍ í Sørvági, ger tað ikki verri, og eg gleði meg til at síggja allar spælararnar aftur, sum eg kenni so væl – eitt nú frá landsliðnum.

Í longri tíð stríddist Sólvá Dimon við ein skaða í økslini, sum gjørdi, at hon ikki fekk sligið ígjøgnum, men í staðin brúkti venjarin hana sum eitt slag av libero. Í síðstuni er hon tó komin fyri seg og hevur ikki longur fortreð av skaðanum.

– Tá eg havi spælt dyst og verið til venjing, havi eg brúkt ein akslahitara, ið hevur hjálpt væl. Eg havi onga pínu longur í økslini, men eri nokk so eym eftir dyst og venjing, tá armurin hevur verið brúktur, sigur tvørakvinnan, ið hevur fingið at vita frá Brøndby VK, at har vildu tey fegin sæð hana aftur sum spælara, tá hon eftir ætlan fer niður aftur í august mánaði.

# Avgerandi uppgerð í Klaksvík

**Mjølnir og Dráttur hittast sunnudagin í uppgerð, hvørki liðið hevur ráð at tapa, meðan triðja liðið, ið liggur framvið har frammi, TB, hevur lættan útidyst**

Nú kappingin í Eik-liguni hjá kvinnum er farin at halla, økist spenningurin um, hvør skal í FM-finaluna ímóti SÍ, sum í løtuni er seks stig framman fyri næstu liðini og tí hevur gott og væl annað beinið í finaluni.

Tvey av liðunum, sum liggja framvið, spæla sunnudagin ímóti hvørjumøðrum, tá Mjølnir í Badmintonhøllini í Klaksvík tekur ímóti Drátti. Her hevur hvørki liðið ráð at tapa, tí saman við teimum er TB í trunkanum – men við fleiri dystum at geva út av.

Serliga hjá Drátti ræður um at vinna nú, tí annars ganga møguleikarnir undan. Men samstundis ræður eisini um hjá Mjølni at vinna, tí annars verður trumfurin spældur upp í hendurnar á TB.

Tvørakvinnur skulu hesa ferð spæla útidyst á Kamsdali ímóti ÍF, sum á pappírinum skuldi verið ein yvirkomilig uppgáva hjá TB, sum nokk má metast sum heitasti avbjóðarin av teimum trimum liðunum, ið liggja aftan fyri SÍ.

Fleyr var leingi við í tí kappingini, men er í síðstuni dragnað so mikið, at liðið ikki longur kann roknast ordiliga upp í kappingina millum tey fremstu. Fleyr skal hesa ferð á heimavølli spæla ímóti KÍF, og í tí dystinum eru havnarkvinnurnar í øllum førum greiður favorittur.

### Mjølnir vil vinna

Hjá monnunum er bara tann eini dysturin hesa ferð, og hann er í Klaksvík millum topp og botn, Mjølnir og ÍF. Her skal Mjølnir bara hugsa um at vinna á ÍF, sum enn einki stig hevur fingið í vetur. Sigurin skal tryggja Mjølnir, at SÍ ikki verður verandi frammanfyri á stigatalvuni.

Mikukvøldið gjørdist greitt, at Mjølnir og SÍ skulu spæla FM-finalurnar hjá monnum, men enn eru ikki allar súður syftar, tí tað av liðunum, ið endar landskappingina sum nummar eitt, fær heimadyst í einari møguligari triðju finalu. Tí fara bæði liðini at royna eftir oddasessinum til tað síðsta.

**hil**

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 15 | 14 | - | 1 | 43 | 8 | 35 | 17 |
| 2 TB | 13 | 10 | - | 3 | 33 | 15 | 18 | 11 |
| 3 Dráttur | 15 | 8 | - | 7 | 31 | 23 | 8 | 11 |
| 4 Mjølnir | 14 | 9 | - | 5 | 32 | 21 | 11 | 10 |
| 5 Fleyr | 14 | 7 | - | 7 | 26 | 25 | 1 | 7 |
| 6 ÍF | 15 | 2 | - | 13 | 7 | 40 | -33 | 2 |
| 7 KÍF | 14 | 0 | - | 14 | 2 | 42 | -40 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 15 | 11 | - | 4 | 37 | 20 | 17 | 16 |
| 2 Mjølnir | 14 | 11 | - | 3 | 35 | 15 | 20 | 15 |
| 3 Fleyr | 15 | 6 | - | 9 | 31 | 32 | -1 | 8 |
| 4 ÍF | 14 | 0 | - | 14 | 3 | 39 | -36 | 0 |

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

**Steypafinala, kvinnur**
13/02 13.30 Stjørnan-VÍF

**Steypafinala, menn**
13/02 16.00 Kyndil-Neistin

**Steypafinalur, ung**
14/02 12.50 Neistin-StÍF (gentur 10)
14/02 13.25 H71-Tjaldur (dreingir 10)
14/02 14.00 Kyndil-Neistin (gentur 12)
14/02 14.45 Kyndil-Tjaldur (dreingir 12)
14/02 15.30 Kyndil-Neistin a (gentur 14)
14/02 16.30 H71-VÍF (dreingir 14)
14/02 17.30 Kyndil-H71 (gentur 17)
14/02 18.45 Kyndil-H71 (dreingir 17)

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**
14/02 14.00 ÍF-TB
14/02 14.00 Mjølnir-Dráttur
14/02 16.00 Fleyr-KÍF

**Eik-ligan, menn**
14/02 16.00 Mjølnir-ÍF